Íslandsvegur 10, FO-100 Tórshavn
Tlf. 211428 – adhd@adhd.fo - www.adhd.fo

**Viðmerkingar um lógaruppskot**

*Tórshavn, hin 24.oktober 2023*

ADHD felagið mótmælir staðiliga at góðtaka uppskotið hjá samgonguni um at strika serliga stuðulsveiting til lesandi, ið bera brek. Broytingin í lógini hevði gjørt tað nógv verri fyri ung við ADHD at gjøgnumføra miðnámsútbúgving og víðari lesnað.

ADHD felagið loyvir sær at gera viðmerkingar til málið, tí hesar broytingar kunnu raka okkara limir sera meint. Vit í nevndini í ADHD felagnum arbeiða sjálvboðið og ólønt og hava tí ikki stundir til at nærlesa uppskotið, men hava hesar viðmerkingar.

Nágreiniliga mótmælir ADHD felagið staðiliga, at trivnaðarnevndin góðtekur lógaruppskotið

> *LM-023/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk sum ber við sær, at serlig stuðulsveiting til fólk, ið ber brek, verður strikað.*

Tað, at ganga í skúla hjá einum við ADHD, krevur alla tína orku. Tú skal hava yvirblikk yvir øll skúlating og innlatingar, ofta á 2-3 ymiskum pallum ísenn. Tú skal skipa tína tíð, so tú fært gjørt tey ting, tú skal, til tíðina. Og fyri at megna skúlan og fylgja við, skal svøvnurin vera í lagi, tú hevur ofta tørv á heillivági og fíggjarliga grundarlagið má vera í ordan. Alt ting, sum fólk við ADHD hava tað torført við. Partur av diagnosuni er netupp at hava trupulleikar við sokallaðu eksekutivu førleikunum, sum eru at hava yvirblik og skipa sín dag.

Tað er ikki ókent, at ung við ADHD fáa nógva hjálp frá bæði foreldrum og eitt nú logopediini á Glasir ella lestrarvegleiðingini, men tað er eisini ein sannroynd, at hjálpin og stuðulin til at megna sína skúla ella lestur er sera avmarkað. Tá tú hevur ADHD, eru sannlíkindini fyri at fáa eina útbúgving nógv minni.

Hagtøl í Danmark vísa, at av 25 ára gomlum hava bert 33% við ADHD eina miðnámsútbúgving, hetta í mun til 80% av øllum. Færri enn 10% hava eina longri útbúgving ímun til 1/3 av restina av fólkunum. Fært tú diagnosuna nóg tíðliga og fært viðgerð og stuðul, betrast møguleikarnar munandi.

Ung við ADHD hava oftast ikki møguleika til eisini at hava eitt arbeiði við síðunnar av skúla, tí øll orkan fer til skúlan. Ung við ADHD megna nóg illa skúlan sum er, tí at ganga í skúla nettup setur høg krøv til alt tað, tú hevur trupult við, tá tú hevur ADHD.

Sum støðan er í Føroyum í løtuni, fáa fólk ofta staðfest ADHD seint, og í nógvum føri so seint, at tey longu hava fingið aðrar hjádiagnosur sum t.d. angist og tunglyndi. Tey eru tí ofta illa fyri og hava tørv á nógvum stuðli og hjálp at megna skúla. Tá hevur møguleikin at fáa fíggjarligan stuðul frá Almannaverkinum ofta verið kærkomin, tí tað ger, at tey hava møguleika at fokusera á skúlagongdina og megna at gjøgnumføra hana - heldur enn at noyðast at hava arbeiði við síðunnar av og tískil ikki megna skúlan.

At strika henda møguleika er at gera umstøðurnar munandi verri fyri tey ungu, ið hava størstan tørv, tí tey megna ikki at arbeiða. At strika veitingina fer ikki at broyta ta fortreyt, at tey ungu sum hava brek, ikki megna at arbeiða við síðunnar av skúla. Tey, ið hava fingið serliga stuðulsveiting eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, eru mett at hava so stóran tørv á tí, at tey ikki megna gerandislívið uttan.

ADHD felagið er staðiliga ímóti ætlanini hjá Landsstýrinum at skera stuðul og hjálp til tey, sum hava allarmest tørv á tí.

Fyri okkum í ADHD felagnum er tað púra óskiljandi at eitt slíkt uppskot kann verða lagt fyri Føroya Løgting heilt uttan fyrst at hoyra tey, ið verða rakt.

Vit heita tí inniliga á Føroya Løgting um at afturvísa lógaruppskotinum ella á allar løgtingslimir um *ikki* at samtykkja lógaruppskot LM-023/2023.

Virðingarmest,

Nevndin í ADHD felagnum

Bjørg Dam
Poula Patursson
Maiken á Mýrini
Pætur Nattestad Petersen
Petra Weihe Mikkelsen
Laura Kathrine Apol
Edmund Djurhuus
Eyð-Britt Tjaldrastein
Louisa Fjallsbak
Berit Unn Petersen